# Arbeiðarin og áskoðarin




&




Í valvideo #12 (24. august 2019), kemur Sjúrður Skaale við 6 spurningum til Hanus Hansen. Valvideo #12 var partur av eini filmsrøð, ið var at síggja á facebookvanganum hjá Sjúrði Skaale, upp undir løgtingsvalið 31. august 2019.




Valvideo #12 hevði 183 vælnøgdar áskoðarar; meginparturin búsitandi í miðstaðarøkinum.

Ein av áskoðaranum var Bergtóra Høgnadóttir. Hon sigur seg gleðast: "So sera viðkomandi og tankavekjandi spurningar tú hevur sett her. Gleði meg at hoyra svarini," sigur hon.

Svarini til spurningarnar hjá Sjúrði Skaale kunnu lesast á Norðlýsinum, 28. august 2019.

Tíverri hoyrdist onki aftur frá teimum 183 ovurfegnu áskoðaranum. Tað ber tí ikki til at siga um teir framvegis eru vælnøgdir við spurningarnar og svarini.

Tey 14 valvideos hjá Sjúrði Skaale, søgdu ikki so nógv um hvat hann fór at takast við, um hann varð valdur í Løgtingið, men snúði seg meira um grønsápu, dunnur og danskt vatn.

**Eitt skjótt vaksandi tal av áskoðarum**




Fyri 100 árum síðani var tað umleið ein áskoðari fyri hvørji 7 arbeiðsfólk í Føroyum. Í dag er støðan vend, soleiðis at tað eru umleið tríggir áskoðarar fyri hvørt arbeiðsfólk. Talið av áskoðarum er serliga nógv vaksið seinastu árini.

### **Are you a doer or a watcher?** *by Mary Maguire*

> I've personally witnessed the power of people to make things happen, create positive change, raise profile regionally and nationally and I'm going to share this with you … *and* what made things happen.
>
> There are 2 types of people – **watchers** and **doers**
>
> **Watchers** read social media, news, current affairs, often agreeing about the things they've read, heard or seen. But, that's it … that's all they do – observe …
>
> **Doers** will observe, but then:
>
> - Ask themselves "how can I help?"
> - Give their time;
> - Participate;
> - Be the source of new ideas and share their thoughts;
> - Offer help, then follow through and do what they say they will do;
> - Commit to actions and then do them!

### Sjúrður er ikki einsamallur áskoðari

Larmurin frá áskoðaraplássinum, kemst ikki av at hesi fólkini hava stórvegis royndir ella vitan um fiskivinnuna. Og tú sært ikki Sjúrð ella Aksel standa í bíðirøðini at sleppa til skips.




> **Áskoðarin,** Aksel V. Johannesen (20. februar 2019):
>
> Minnast tit, tá Jørgen Niclasen sum fiskimálaráðharri útskrivaði tvey fiskiloyvi ein dag, og dagin eftir vórðu skipini seld fyri stórar upphæddir? […]

> **Arbeiðarin,** Líggjas Johannesen:
>
> Jú vit minnast; vit minnast eisini at ein reiðari í Vágum seldi 2 skip og 3 fiskiloyvir suður til Vágs. Eitt er at hesir reiðarar í Vestmanna og Vágum fingu pening fyri at selja sínar kvotur, men verðandi samgonga heldur ivaleyst at teir fingu ovlítið burturúr, teir hava nú eisini við eini politiskari útlutan, útluta júst hesum persónum nýggjar kvotur … sokallaðar menningarkvotur.

### Politisk sannføring




Eins og í grannalandinum Bretlandi, so er áskoðarin í Føroyum sum heild vinstrasinnaður (*Labour*), meðan arbeiðarin heldur seg til høgru (*Conservative*). Sum í flest øllum øðrum londum býr áskoðarin fyri tað mesta í høvuðsstaðnum, meðan arbeiðsfólkið livir á vinnuplássum kring landið.

**Bláa gongustjørnan** — *tvey ymisk fólkasløg*




**Tey arbeiðandi** eru fáorðað og vísa samfelagsábyrgd. Tey gera ikki nógv hóvasták burtur úr sær sjálvum, men eru altíð tilreiðar at taka tey tungu tøkini, fyri at hava samfelagshjólini malandi. **Áskoðararnir** larma illa og fylla nógv í almenna rúminum. Teir hava ilt við at góðtaka at lív er uttanfyri bøgarðarnir í Tórshavn.

# Framleiðsla av heitari luft

Tað er torført hjá vanligum arbeiðsfólki at skilja, at tað finnast fólk sum liva av at framleiða heita luft. Tað sum er enn meira undrunarvert er, at ein maður sum Sjúrður Skaale fær árliga 660 tús. kr. — sum grundløn — fyri at fortelja skemtisøgur á fólkatingi. Harumframt kemur ein ørgrynna av eyka ágóðum, eitt nú endurgjald fyri hotell- og ferðaútreiðslur[1].

Í vikuskiftinum 17.-19. august 2017, var ein ógvusligur stormur á Facebook. Tað var komið alment fram at Atlantsflog hevði givið nøkrum múgvandi *frequent-flyers*[2] nakrar fyrimunir við einari nýggjari bonusskipan.

Ongin visti at siga hvat skipanin kallaðist ella hvør hevði fingið lut í hesari bonusskipan. Gingið var út frá, at talan var um ríkar reiðarar sum høvdu tiltuska sær hesar fyrimunir.

Hvar var Sjúrður Skaale í hesum orðadrátti? Hann plagar ikki at smæðast fyri at leggja uppí har okkurt óvanligt er áfatt. Sambært einum nógv umstríddum journalisti í Kringvarpinum er Sjúrður Skaale serliga vikin á Facebook í vikuskiftunum. Men, hvar var hann nú?



Eg var stúrin fyri góða vini mínum og fór at leita. Tað vísti seg tíbetur, at ongin orsøk var at óttast. Ein grønur prikkur á vinarligu andlitsmyndini boðaði frá at alt var okey.

---

[1] Tað er vaskikonan á Vesturbrúgv sum arbeiðir fyri lønina og sersømdirnar hjá Sjúrði Skaale.

[2] A frequent-flyer is a person who regularly travels by plane on commercial flights, especially one who is registered as a member of an incentive scheme for such travellers.

**Sjúrður kemur út úr skápinum**

Týsdagin, 21. august, ringir telefonin hjá Sjúrði Skaale; tað er Kringvarpið ið vil tosa við fólkatingslimin um eitt bonuskort hann sigst hava fingið frá Atlantsflogi.



Óvanliga smæðin og við reyðum kjálkum, kemur Sjúrður úr skápinum, har hann hevur krógva seg alt vikuskiftið.

Í samrøðuni við Kringvarpið sigur Sjúrður m.a. at flogfeløg kappast á øllum parametrum, “mann kappast ikki minst um teir mest lukrativu kundarnir, tað gera øll flogfeløg í allari verðini,” sigur hann.

Tað er kortini ikki rætt, tí Ryanair, ið er eitt tað største og mest framkomna flogfelag í Evropa, hevur onga bonusskipan sum gevur sersømdir til lukrativar kundar. Ryanair er hinvegin eitt *low-cost*[3] flogfelag sum í høvuðsheitum er fyri tað arbeiðandi fólkið.

Hartil kemur, at tað er vísindaliga staðfest at *frequent-flyer* bonusskipanir fáa fólk — sum Sjúrður Skaale — at flúgva enn meira og harvið gera óbótaligan skaða á umhvørvið.

“**Eg skal stutt forklára** …” skrivar Sjúrður Skaale í einari grein, aftaná at hann hevði tosað við Kringvarpið. Men, tað sum hann ikki forklárar fyri okkum er, at tað er vaskikonan á Vesturbrúgv sum hevur sveitta fyri ferðaseðilin hjá honum. Hevði Sjúrður flogið við SAS, so hevði danski statskassin fingið nakrar krónur aftur av ferðaútreiðslunum. Ístaðin keypir Sjúrður Skaale ein dýran ferðaseðil frá Atlantsflogi, sum er í harðari kapping við SAS.

Fólkatingið hevur annars gjørt leiðreglur fyri ferðing hjá fólkatingslimum, m.a.: *Ved valg af transportmiddel og rejseklasse skal lægges vægt på, hvad der i den konkrete situation er det mest økonomiske og hensigtsmæssige for Folketinget* […].

**Gagnar øllum** — *pástendur Sjúrður Skaale*

[…] vissi tey, sum hava nevndu rættindi (Eurobonus *-ed.*), vilja varðveita tey - so mugu tey skifta frá Atlantsflog til SAS. Og so missir Atlantsflog altso nakrar sera lukrativar kundar. Kundar, sum í mongum førum koyra millum 50.000 og 100.000 krónur inn í felagið árliga.

[3] A low-cost airline is an airline that is operated with an especially high emphasis on minimizing operating costs and without some of the traditional services and amenities provided in the fare, resulting in lower fares and fewer comforts.

Og tað gongur út yvir øll. Tí jú fleiri tey eru, sum flúgva ofta við dýrum ferðaseðlum - jú fleiri kunnu eisini flúgva við bíligum ferðaseðlum.

**Hevur Sjúrður tað gott, hava vit øll tað gott**

> Flóvin Eidesgaard Orsøkin til at vit hava fingið eina sjúka kapitalismu er at alt ov mong, sum kunnu ger nakað við tað, reagera sum Sjúrður: Tað sum er gott hjá Sjúrði klárar hann við eini hálvari analysu at fáa til at gagna øllum, so tað skal ikki broytast. Nei, hesar skipanir gagna ikki brúkaranum, men eru nakað flogfeløgini gera fyri at kappingin ikki skal virka til frama fyri kundan.

> Sjúrður Skaale Also: eg skuldi heldur virkað fyri at avtikið møguleikan hjá SAS (og kanska øllum øðrum feløgum) at bjóða sínum "frequent flyers" serskipanir? Kanska. Men sindur langt perspektiv, ha? Og tað hevði verið dýrt fyri føroyska felagi ta tíðina tað hevði tikið…

> Flóvin Eidesgaard Tú kemur við eini økonomiskari analysu av slíkum skipanum sum er minni enn helvtin av tí týdningarmesta. Alt tað sum er eftir sigur at skipanirnar eru skaðiligar fyri brúkaran, men tú sigur við tínum triðings argumenti, at tað gagnar øðrum, at tú fært fyrimun.

**Losing his marbles**

> Sjúrður Skaale Eg sigi at tað gagnar AA (og teimum sum eiga AA) at AA sleppur at kappast móti SAS um teir lukrativastu kundarnar. Tað handlar ikki um meg - eg hevði ikki farið til SAS kortini. Men AA hevði tapt um felagið ikki tók kappingina upp.

> Flóvin Eidesgaard Undiryvirskriftin sigur "Gagnar øllum"

Tað sær út til at Sjúrður Skaale kortini ikki hevur tað so gott. Alt ov nógv heit luft og eitt ótal av viðmerkingum, hava ført til at minnið er farið at bila. Hann er eisini í villareiði um hvør politisk hugsjón liggur sum grund fyri hansara argumentum.

“Hugsjónir kunnu eisini gerast andalig fongsul. Kynstrið er at kenna munin millum fret og skerpikjøt,” sigur Sjúrður Skaale í stuttsøguni *Fretur ella Skerpikjøt*.



Sjúrður Skaale fór úr Tjóðveldi, ið hevði eina ambitiøsa hugsjón: LOYSING.
Síðan fór hann upp í Javnaðarflokkin, sum hevur eina enn hægri hugsjón:
FRÆLSI, JAVNSTØÐA & SAMHALDSFESTI. Spurningurin er um hvør av
hesum hugsjónum er fretur og hvør er skerpikjøt.

# Sjúrður Skaale á stýrisfundi í Helsinki

*the frequent-flyer and high-flyer*



*"Her síggja vit fundarrúmið hjá tí Norðurlendska Investeringsbankanum sum heldur til í Helsinki í Finnlandi. Hetta er ein banki sum norðurlensku stjórnirnar eiga í felag og eg umboði Fólkatingið í bankanum,"* sigur ein smart ílatin Sjúrður Skaale.

Sjúrður Skaale heldur fram:

> Eitt av projektunum sum fer at fáa heilt betýðiligt lán komandi tíðina, tað er eitt projekt ið Noreg og Svøríki sum snýr seg um at framleiða battarí til elbilar uppá ein nógv grønari máta enn tað verður gjørt í dag yviri í fjareystri. T.d. skal øll orkan til framleiðsluna koma frá vindmyllum. Projektið kostar yvir 20 milliardir krónur [...]

Tað at Sjúrður Skaale pástendur at øll orkan til framleiðsluna skal koma frá vindmyllum, avdúkar, at hansara grundleggjandi vitan um orku og búskap er rættiliga avmarkað.

Ongin hevði í dag basera nakra framleiðslu einans uppá orku frá vindmyllum, tí vindorka er óstøðug. Og sjálvt um tann heiti luftstreymurin sum kemur frá Sjúrði Skaale er rættiliga stabilur, so hevði hann gjørt lítlan mun til eina verkætlan sum kemur at kosta 20 mia. kr..

Um Sjúrður veruliga var áhugaður í verkætlanini, so kundi hann havt gjørt sítt heimaarbeiði áðrenn hann fór til Helsinki, tí Northvolt AB hevur á ongan hátt dult fyri, at orkan til battarí-framleiðsluna verður *predominantly hydro power, and to a lesser extent wind energy.*

Tað er umráðandi fyri umhvørvið at ferð kemur á framleiðsluna av battaríum til elbilar, ongantíð ov skjótt, og tað hevur líka so stóran týdning, at tað ikki verða alt ov nógvir Sjúrðar í fundarhølum, har týðandi avgerðir verða tiknar.

GG: Sjúrður Skaale er eisini limur í eftirlitsnevndini hjá NEFCO[4]. Har verður m.a. sagt:

> **To the Nordic Council of Ministers** Following the audit performed, we note that the Corporation's operations during the financial year have been conducted in accordance with the Statutes, and that the financial statements as at 31 December 2019 provide a true and fair view of the financial position as at 31 December 2019, as well as on the result of the operations and cash flows during year 2019. In accordance with the statement of comprehensive income the profit for 2019 amounts to EUR 1 398 134. – *Sjúrður Skaale et al.*

Fólk ið mangla praktiskar og fakligar førleikar, eru sum oftast tey sum flúgva hægst.

[4] NEFCO is an international financial institution (IFI) established in 1990 by the Nordic countries.

# Spurningur #5 í valvideo #12

At gera íløgur, er eitt fyribrigdi sum áskoðarnir hava torført við at skilja. Sjúrður Skaale er onki undantak. Hann gerst fjálturstungin tá hann hoyrir um fólk sum gera íløgur.




Hanus Hansen:

> […] Hollendarar hava ikki enn fingið afturgoldið íløguna í P/F Næraberg, men eg rokni við, at teir halda áfram í Føroyum, tí teir vóna at fáa lut í eini virðisøking.
>
> Eg veit ikki, um eg eri tann rætti at svara hesum spurningi, um hví hollendararnir hava gjørt íløgur í Føroyum. Tað hevði helst verið betri, um Sjúrður spurdi hollendararnar sjálvar. […]

Sjúrður Skaale setti seg ongantíð í samband við hollendsku fyritøkuna. Teir 6 spurningarnir hann setti Hanusi, góvu eina sterka ábending um at Sjúrður veruliga var áhugaður í fiskivinnuni. Men, tá til stykkis kom, var eldhugurin fyri sjólívinum kólnaður.

Sjúrður slepti eisini dreyminum um at gerast reiðari ella at seta pengar í føroysku fiskivinnuna. Ístaðin fór hann aftur á Fólkating at fortelja søgur.

**Eitt nýtt og betri samfelag**



2030



Í framtíðini fara fólk helst at gera sum Sjúrður Skaale. Vit fara øll at eygleiða hvønn annan, samstundis sum vit finna okkum eitt trygt og sunt arbeiði, uppi á landi. Tað verður ikki talan um at gera íløgur í nakað so óvist og flótandi sum fiskivinnuna.

Poul A Mikladal
á hásumri 2020
mikladal@yahoo.com